Fylgiskjal 15

LM-070/2020

Súsanna í Stórhúsi

Fra: Fíggjarmálaráðið
Emne: VS: Viðmerkingar til lógaruppskotini til broytingar í rentutryggingarlógini og eftirlønarlógini
Vedhæftede filer: EL hækkandi skatta%.xlsx

AppServerName: fak-360-web01.fak.far.local

AKT 32 Hoyringssvar frá TAKS

Fra: Birta Biskopstø <Birta.Biskopsto@taks.fo>
Sendt: 10. februar 2020 14:39
Til: Jákup Eyðfinn Kjærbo <jek@fmr.fo>
Cc: Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Rúna Fossdal Guttesen <RunaFossdal.Guttesen@taks.fo>
Emne: Viðmerkingar til lógaruppskotini til broytingar í rentutryggingarlógini og eftirlønarlógini

Hey Jákup Eyðfinn

TAKS hevur niðanfyri standandi viðmerkingar til broytingaruppskotini í áviksavíst rentutrygginarlógini og eftirlønarlógini

Savningarlógin/Eftirlønarlógin og Rentutryggingarlógin – (rætting viðv. eftirløn uttanfyri Eftirlønarlógina, strikað prísjavning av upphæddum og ymiskar nágreiningar):

TAKS hevur onga viðmerking til tað, sum stendur í uppskotinum. Tó verður malt til, at nakrar broytingar verða gjørdar í ásetingarlógini:

1. § 1, stk. 2, 2. pkt. í ásetingarlógini má eisini broytast. Sambært § 1, stk. 2 í ásetingarlógini rinda tey, sum arbeiða uttanlands ein bruttoskatt á 35 % fyri uttanlandsinntøku aftaná uttanlandsfrádráttin. Í 2. pkt. er ásett at, Í tann mun, tey í 1. pkt. nevndu hava skyldu til at rinda inngjald sbrt. løgtingslóg um eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn og rentutryggingum, verður skattur teirra ásettur eftir frádrátt fyri hetta inngjald. Um ætlanin er at hesi skulu varðveita rættin til frádrátt fyri inngjøld til eftirlønarskipanir, so eigur at verða ásett, at í tann mun hesi rinda til skipanir fevndar av løgtingslóg um eftirløn ella løgtingslóg um rentutrygging, verður skattur teirra ásettur eftir frádrátt fyri hetta inngjald.

2. Sambært § 8, stk. 2 í ásetingarlógini rinda tey, sum hava FAS-inntøkur ein bruttoskatt á 35% og ásett er, at skattur teirra verður ásettur eftir frádrátt fyri inngjøld sbrt. løgtingslóg um eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn og rentutryggingum. Tilvísingin eigur at verða broytt til inngjøld eftir løgtingslóg um eftirløn.

Eftirlønarlógin: (Frítøka fyri uttanlandsinntøku, hækking av bundna inngjaldinum og javnbjóðis kapping millum efitrlønarveitarar)

1. Tá § 1, stk. 9 verður strikað og uttanlandsinntøka í staðin verður undantikin frá kravinum um eftirløn sambært eftirlønarlógini, so eigur § 12, stk. 2, 3. pkt. eisini at verða strikað.
   § 12, stk. 2, 3. pkt. ásetur, at tann persónur, sum er skyldugur til at rinda eftirlønargjald í Føroyum av inntøku, vunnin uttanlands, undantikin § 1, stk. 9, verður góðskrivaður í eftirlønarskattinum fyri inntøkuskatt, persónur hevur goldið av eftirlønargjaldinum uttanlands.

2. Tað manglar ein heimild í eftirlønarlógini at heinta pening aftur av eftirlønarkonto hjá eftirlønarsamansparara í førum, har skattaprosentið av longu inngoldnum eftirlønargjøldum verður broytt aftaná, at endaligur skattur er uppgjørdur og rest er goldið eftirlønarveitara. Broytist skattskylduga inntøkan aftaná at endaligur eftirlønarskattur er gjørdur upp og rest er avroknað er til eftirlønarveitara, kann

skattasatsurin av tí longu inngoldna eftirlønargjadlinum broytast. Hjálagt er rokniark, sum vísir munin í eftirlønarskattinum. Eitt fyri 2020, har kravið er 6% í inngjaldið og eitt fyri endastigið 12%. Tað er ikki nógv, sum verður flutt í kr., men 30% í mun til 40% er sjálvandi 25% av eftirlønarskattinum. (munurin verður ikki meira enn max 4.000 kr. um ári)

Í nøkrum førum ber til at mótroknað tann hækkaða skattin - írestandi skattin, í tí eftirlønargjaldi, sum skal krevjast afturat frá eftirlønarsamansparara av hækkaðu skattskyldugu inntøkuni, men tað er ikki altíð pláss fyri írestandi skattinum í teimum eftirlønarinngjøldum sum skulu rindast afturat.

Írestandi skatturin av tí inngjaldið, sum longu er goldið og avroknað, eigur at verða tikin av eftirlønarkontuni, um tað ikki ber til at mótrokna í inngjøldum, sum koma afturat. Eftirlønarveitarin hevur longu goldið rætt eftirlønargjald av tí partinum av skattskyldugu inntøkuni, sum var uppgjørd rættstundis, og tí skal ikki krevjast meir frá honum. Tað er bert lutfallið millum skattin og tann partin, sum skal til eftirlønarveitaran, sum verður broytt við at skattaprosentið verður broytt.

Tað verður mælt til í § 12, stk. 2 at seta inn aftaná 2. pkt.: "Verður skattskylduga inntøkan hækka eftirfylgjandi og hetta førir til at skattasatsurin sbrt. skjali 1 av longu inngoldnum eftirlønargjøldum hækkar, verður írestandi skattur av longu inngoldnum eftirlønargjøldum fluttur landskassanum av konto eftirlønarsamanspararans."

Við hesum fær eftirlønarveitarin heimild og skyldu til, av konto eftirlønarsamanspararans, at flyta landskassanum írestandi skatt, sum kemur í orsakað av at eftirlønarsamansparari eigur at rinda hægri prosentsats av longu goldnum eftirlønargjøldum.

Vinarliga

Birta Biskopstø
deildarleiðari

Lógardeildin

TAKS

Postrum 2151, 110 Torshavn

www.taks.fo, taks@taks.fo, tel. 35 26 00

Fyrivarni

Ert tú ikki rætti móttakari av hesum teldubræv, vinarliga sig mær frá og sletta bræv

Inntøka	**235.000**	**240.000**	**245.000**	**250.000**	**255.000**	**260.000**	**265.000**	**270.000**	**275.000**	**280.000**	**285.000**
6% eftirløn	14.100	14.400	14.700	15.000	15.300	15.600	15.900	16.200	16.500	16.800	17.100
40% eftirlønarskattur	5.640	5.760	5.880	6.000	6.120	6.240	6.360	6.480	6.600	6.720	6.840
Hækkandi EL skatta%	30,0%	30,5%	31,0%	31,5%	32,0%	32,5%	33,0%	33,5%	34,0%	34,5%	35,0%
Hækkandi eftirlønarskattur	4.230	4.392	4.557	4.725	4.896	5.070	5.247	5.427	5.610	5.796	5.985
Munur í eftirlønarskatti	**1.410**	**1.368**	**1.323**	**1.275**	**1.224**	**1.170**	**1.113**	**1.053**	**990**	**924**	**855**

Inntøka	**235.000**	**240.000**	**245.000**	**250.000**	**255.000**	**260.000**	**265.000**	**270.000**	**275.000**	**280.000**	**285.000**
12% eftirløn	28.200	28.800	29.400	30.000	30.600	31.200	31.800	32.400	33.000	33.600	34.200
40% eftirlønarskattur	11.280	11.520	11.760	12.000	12.240	12.480	12.720	12.960	13.200	13.440	13.680
Hækkandi EL skatta%	30,0%	30,5%	31,0%	31,5%	32,0%	32,5%	33,0%	33,5%	34,0%	34,5%	35,0%
Hækkandi eftirlønarskattur	8.460	8.784	9.114	9.450	9.792	10.140	10.494	10.854	11.220	11.592	11.970
Munur í eftirlønarskatti	**2.820**	**2.736**	**2.646**	**2.550**	**2.448**	**2.340**	**2.226**	**2.106**	**1.980**	**1.848**	**1.710**

AKT 32 TAKS

LM-070/2020

290.000	295.000	300.000	305.000	310.000	315.000	320.000	325.000	330.000
17.400	17.700	18.000	18.300	18.600	18.900	19.200	19.500	19.800
6.960	7.080	7.200	7.320	7.440	7.560	7.680	7.800	7.920
35,5%	36,0%	36,5%	37,0%	37,5%	38,0%	38,5%	39,0%	39,5%
6.177	6.372	6.570	6.771	6.975	7.182	7.392	7.605	7.821
783	**708**	**630**	**549**	**465**	**378**	**288**	**195**	**99**

290.000	295.000	300.000	305.000	310.000	315.000	320.000	325.000	330.000
34.800	35.400	36.000	36.600	37.200	37.800	38.400	39.000	39.600
13.920	14.160	14.400	14.640	14.880	15.120	15.360	15.600	15.840
35,5%	36,0%	36,5%	37,0%	37,5%	38,0%	38,5%	39,0%	39,5%
12.354	12.744	13.140	13.542	13.950	14.364	14.784	15.210	15.642
1.566	**1.416**	**1.260**	**1.098**	**930**	**756**	**576**	**390**	**198**